## Krevja endurgjald fyri seismikkskjóting

70 fiskimenn í Nordland í Norðurnoregi vilja hava endurgjald fyri miss, sum teir siga seg hava havt orsakað av seisminskum kanningum hjá oljufeløgunum, annaðhvørt tí teir hava fingið minni, ella tí teir hava verið noyddir at flyta til aðrar leiðir. Krøvini eru sera ymisk. Summir vilja nhava nakrar tíggjutúsund krónur, meðan aðrir halda seg hava mist fyri fleiri hundraðtúsund krónur. Ein talsmaður hjá fiskimálaráðnum sigur við Nordlys, at tilsamans hava fiskimenninir søkt um einar sjey milliónir krónur í endurgjaldi.



# Thor Goliat var hin lítli



*Norðbúgvin er 55 metrar langur, og Thor Goliat er slakar 25. Hetta var tó eingin trupulleiki, tá hin minni sleipaði hin størra til Danmarkar um mánaðarskiftið oktober/ november*

*Myndir: Birgir W. Høgnesen*



**Ídnaðartrolarin Norðbúgvin liggur ikki longur í Vestmanna. Skipið er selt sum gamalt járn. Tað var lítli sleipibáturin Thor Goliat, sum sleipaði trolaran niður til Esbjerg**

GAMALT JARN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri fór sleipibáturin hjá Thor í Hósvík, Thor Goliat, til Danmarkar við føroyska ídnaðartrolaranum, Norðbúgvanum.

Føroyska felagið, sum átti skipið, var eitt felag hjá Bjarta Mohr, Sp/f 23.03 2006.

Norðbúgvin hevur leingi ligið í Vestmanna, og seinastu tíðina hevur Fiskaríbankin átt skipið.

Tað er eitt felag í Esbjerg, sum hevur keypt Norðbúgvan til upphøggingar, og tað er hetta felag, sum Thor Goliat hevur loyst sleipiuppgávuna fyri.

Sum skilst, verður Norðbúgvin høgdur upp í Esbjerg og verður síðan seldur sum gamalt jarn.

### Alt gekk væl

Hóast skipið er 55 metrar langt og stívliga 10 metrar breitt, var einki til hindurs hjá Thor Goliat, sum bert er slakar 25 metrar langur, at sleipa Norðbúgvan til Danmarkar.

Gunnbjørn Joensen hjá Thor sigur, at uppgávan gekk væl og at sleipibáturin, sum fór úr Vestmanna við Norðbúgvanum ein av seinastu døgunum í oktober, var í Esbjerg 5. november.

Fýra mans eru við Thor Goliat á eini slíkari ferð.

# 28.000 tons upp á land í Saltangará

**Fram til endan av oktober í ár hevur Landingarmiðstøðin hjá Beta í Saltangará landað stívliga 28.000 tons av ráfiski**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaðu partrolararnir Kalsevni og Grímur Kamban í Saltangará. Teir høvdu umleið 270.000 pund, meginparturin upsi. Skipini vóru so gott sum full undir lúkurnar.

Í dag landa Polarhav og Stjørnan í Saltangará. Skipini taka nógv, og tí eru tey umleið 240.000 pundini, sum tey hava inni, ikki nógv meira enn uppí hálva lastina.

Sum skilst byrjaðu leirvíkstrolararnir hendan túrin á Bill Baily, men hetta miseydnaðist.

Tað tekur umleið eitt samdøgur at sigla á Bill Baily, og tá ein slík roynd miseydnast, fara tvey samdøgur fyri einki.

Polarhav og Stjørnan byrjaðu túrin næstsíðsta sunnudag og hava soleiðis verið úti í níggju dagar, nú tey koma innaftur at landa.

Á Landingarmiðstøðini í Saltangará vænta tey, at partrolararnir Rókur og Lerkur koma inn at landa mikudagin ella hósdagin.

### Nógv arbeiði

Fram til 31. oktober í ár hevur Landingarmiðstøðin hjá Beta landað tilsamans 28.274 tons, harav 6.800 tons er gullaksur.

Føstu landararnir eru 12 í tali, men tá mest er at gera, eru tilsamans 27 fólk til arbeiðis, sum hava við landing og fiskin annars at gera.

Tá partrolarar eru inni, verða bæði skipini vanliga landað í senn.

Landingin í Saltangará gevur soleiðis væl av arbeiði.



*Polarhav og Stjørnan byrjaðu hendan túrin á Bill Baily, men hetta miseydnaðist*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*